




Puntur nr.15

# Flúgv til Hetlands




**Fríggjadagin fer Atlantsflog undir at flúgva til Hetlands, sum ein partur av rutuni til London. Hetta er ein spildurnýggj ruta, men ætlanina hava tey arbeitt longi við, og í Hetlandi taka tey ímóti rutuni við opnum ørmum**

FERÐAMÁL

Keypmannahavn hevur og fer altíð at vera ferðamál nummar eitt hjá føroyingum. Hetta eru tey greið yvir á Atlantic Airways, men tey ynskja, at næst tí listanum skal standa London. Rutan ber seg ikki einsamøll, og áður hava tey roynt at flogið á Aberdeen, sum ein part av Londonrutuni. Atlantic Airways hevur verið í prát við hetlendingar í fleiri ár, um at flúgva á oyggjarnar, og nú hava tey tikið avgerina um, at fríggjadagin skal tað verða.

Hjá hetlendingum er Aberdeen akkurát sum Keypmannahavn fyri føroyingar. Aberdeen er staðið har øll fara, men við tað, at Atlantsflog nú fer undir at flúgva til Hetlands, so verður eisini møguleiki hjá hetlendingum at sleppa til London, og hetta heldur Atlantsflog vera spennandi.

– Tí fáa vit 40 fólk úr Føroyum á rutuna, og 40 fólk úr Hetlandi, so verður rutan heilt áhugaverd, sigur Kent Christensen, sølu- og marknaðarstjóri hjá Atlantic Airways.

Hetlendingar hava í nógv harrans ár leitað eftir einum øðrum ferðamáli enn Aberdeen, og tí eru teir ovurfegnir um, at Atlantsflog nú fer undir at flúgva til oyggjarnar.

## Felagseyðkenni

– Hetland er okkara nærmasti granni, og hóast fólkið í dag tosar enkst, so kunnu føroyingar og hetlendingar oftani hyggja at hvørjum øðrum og síggja felagseyðkenni, sigur Kent Christensen, og vísir millum annað á staðarnøvnini.

Hjá føroyingum eigur Hetland at vera eitt spennandi ferðamál. Har ber til at slappa av og taka tað róligt, og uttan at ein følir at hava flutt seg ov nógv úr heimliga umhvørvinum.

## Nógv fyri pengarnar

– Eisini eru góðir innkeypsmøguleikar har, og har ber til at fáa nógv fyri pengarnar, sigur Kent Christensen hjá Atlantsflog. Hann ivast ikki í, at rutan fer at vera spennandi, og at føroyingar fara at taka undir við henni.

– Vit sóu við Aberdeen, at tann rutan hevði tað trupulti at byrja við, men nú eru vit komin har til, at tað eru teir allar fægstu føroyingarnir, sum ikki hava verið har. Og vit rokna við, at tað fer at vera tað sama við Hetlandi. Tað er bara ein spurningur um tíð, so hava allir føroyingar verið har, sigur Kent Christensen, sølu- og marknaðarstjóri í Atlantic Airways.

Flúgvingin til Hetlands byrjar nú fríggjadagin 23. juni, og heldur hon áfram til 30. oktober. Flogið verður hvønn fríggja- og mánadag, so har eru góðir møguleikar at fara til dømis ein vikuskiftistúr.




